

Tower of London var brúkt sum fongsul í miðøldini og hevur eina sera myrka fortíð við pínslu, drápi og annað sum hoyrdi tíðini til



London Eye er 135 metur høgt og fær man sostatt útsýni yvir allan býin



Tower Bridge hevði ein sera týðandi leiklut av vinnulívinum í Stóra Bretlandi og Evropa, av tí at Tames áin var nýtt til at frakta vørur til og frá London

# Sightseeing í **London**

## Ymisk søvn

Í London eru fleiri ymisk søvn, so sum National History Museum, sum í heyst letur upp eina nýggja deild um Darvin. Savnið er annars sera áhugavert fyri bæði vaksin og børn og er samstundis ókeypis. Avgjørt vert eina vitjan. The National Gallery er eitt listasavn við fleiri heimskendum navnframum listafólkum, so sum Van Gogh og Rembrandt. Savnið liggur væl fyri, mitt á Trifalgar Square og er ókeypis. Sera áhugavert, serliga um ein hevur áhuga í list.

Man kann ikki vitja London, uttan at hava verið á British Museum, sum er eitt savn, ið sera nágreiniliga lýsir heimsins mentanir og søgu. Madame Tussaud's er eitt meira nútímans savn, við voks-figurum av ymiskum kendum fólkum. Røðin er rættiliga long og atgongurmerkið er kostnaðarmikið, men áhugavert og flott at síggja allar tær livandi útgávurnar av ymiskum kendum fólkum.

## Tower of London

Tower of London hevur ein sera týdningarmiklan leiklut í bretskari søgu. Tornið er 900 ára gamalt og var brúkt sum eitt fongsul. Tað hevur sostatt eina sera myrka bakgrund við drápi og pínslu í miðøldini og er møguleiki at síggja vápn og annað áhugavert, so sum krúngimsteinarnir í Bretlandi, ið hava verið goymdir í Tower of London síðani 1303.

## Buckingham Palace

Buckingham Palace var upprunaliga kent sum Buckingham House, sum var bygd av Greivanum av Buckingham í 1703. Síðan hevur Buckingham Palace verið nýtt sum heimið hjá teimum kongaligu í Bretlandi og er ein tann mest kendi bygningurin í heiminum.

Buckingham Palace liggur í Green Park, ið er miðskeiðis í býnum. Tað tekur einar 15 minuttir at ganga frá miðbýnum og kann man eisini taka undirgrundina til Green Park og ganga ígjøgnum parkina, fyri síðani at síggja tann stórsligna bygningin.

## Tower Bridge

Tann 30. Juni 1894 lat prinsurin av Wales, seinni Kong Edvard VII, ta stórslignu brúnna upp, sum er uppbygd av tveimum tornum. Brúgvin stýrdi ferðsluni við farmi um Tames ánna.

Hetta var ein sera máttmikil leið og stýrdi sostatt viðkomandi allari frakt til London, tað vil siga til Bretland og somuleiðis ein stóran part av Evropa, sum fraktaði vørur umvegis Tames ánna í London. Tower Bridge er ein flott og týandi brúgv í søgu bretlands og eitt tiltalandi vitjunarmál hjá ferðafólkum. Brúgvin er í dag sera trafikera, við eini 40.000 fólkum til gongu ella í bilum um dagin og eisini av bátum, sjálvt um tað er eina minka fraktruta. Tilsamans verður brúgvin latin upp fyri eini 1.000 bátum um árið.

## Westminster Abbey

Upprunaliga er heitið á kirkjuni 'The Collegiate Church of St Peter at Westminster', men er best kent sum Westminster Abbey. Westminster Abbey sigst at hava uppruna frá ár 624, men bleiv umbygt av Henry III í 1245 og er staðið har tey kongaligu í Stóra Bretlandi vanliga verða innsett og jarðað. Henry III var eisini tann fyrsti, sum bleiv jarðaður í Westminster Abbey. Kirkjan er sera stórsligin og er avgjørt verd at vitja.

## St. Paul's Cathedral

Sera vakra og hugtakandi kirkjan er frá 1710 og gjørd av Christohper Wren's. Fleiri týdningarmikil fólk hvíla í kirkjuni, so sum greivin av Wellington. Tað er í hesi somu kirkju, at prins Charles og Diana prinsessa blivur vígd. Tað sigst, at Churchill var sera bangin fyri, at St. Paul's Cathedral skuldi bombast undir krígnum og hvønn morgun, tá ið hann vaknaði, spurdi hann, um kirkjan enn stóð. St. Paul's Cathedral er eitt satt høvuðsverk og vert eina vitjan.



**Stórsligna kirkjan, Westminster Abbey, hevur uppruna frá ár 624 og verður í dag nýtt til at innseta og jarða tey kongaligu í Stóra Bretlandi**



Buckingham Palace er ein tann kendasti bygningurin í heiminum og heimstaður hjá bretsku drotningini